# Fiskivinnuni tørvar møguleikar – ikki forðingar

AKSEL V.
JOHANNESEN



Seinastu tíðina hevur gingið av skriðjuni í fiskivinnuni, ella rættari sagt hjá heimaflotanum. Einki nýtt í hesum, tí tað hava altíð verið upp- og niðurgangstíðir innan fiskivinnnuna.

Heimaflotin líður undir einari tilfeingiskreppu, men orsøkin til ringu støðuna hjá heimaflotanum er ikki einans vantandi tilfeingi. Verður hugt at heimaflotanum, so hevur hesin í søguligum høpi ikki givið nakað avkast gjøgnum árini. Tað hava sjálvsagt verið tíðarskeið, har ávísir skipabólkar hava givið stórt avkast, men verða øll árini og allir skipabólkar lagdir saman, so hevur heimaflotin ikki givið avkast.

Tá so er, er okkurt ravruskandi galið! Ongin ivi er um, at okkara vinnulívs- og sjófólk eru rættiliga dugnalig. Eygað eigur tí heldur at verða vent móti teimum skipanum, sum vinnan virkar undir. Eru trupulleikar við skipanini, eigur politiski myndugleikin sjálvandi at gera neyðugar tillagingar og broytingar. Okkara heimafloti kann og skal gerast fíggjarliga burðardyggur.

**Fiskaframleiðsla á sjógvi**
Sum er, hevur fiskiflotin ikki møguleika at virka fiskin umborð. Talan er hvørki um eina tekniska forðing, ella tí tað ikki lønar seg. Orsøkin er heilt einfalt hon, at lóggávan forðar tí.

Varð fiskurin virkaður umborð, hevði tað sjálvsagti givið heimaflotanum nógv størri framleiðsluvirði og eisini økt munandi um møguleikaranar hjá flotanum at fingið eitt avkast á botnlinjuna.

Samstundis hevði hetta havt við sær, at samlaða útflutningsvirðið hjá húsarhaldinum Føroyar hevði hækkað munandi. Eftir verandi skipan er tað ofta so, at fiskurin ikki kemur í framleiðslu, fyrr enn hann er upp til tíggju dagar gamal. Talan er tí als ikki um feskan fisk. Kræsnu gómarnir á evropeiska meginlandinum vilja hava feskan fisk og rinda munandi meira fyri feskleikan. Tískil fara stór virði fyri bakka við verandi skipan.

**Brúksskylda**
Útsøgnir úr fíggjarheiminum boða frá, at áhugin fyri at gera íløgur í fiskivinnuna er nógv minkaður. Ein orsøk sigst vera, at heimaflotin er ov stórur, og fiskatilfeingið tí er ov smábýtt - ov lítið er til hvørt skipið. Tilmælið er tí, at flotin verður minkaður.

Seinastu árini hava fiskifrøðingar somuleiðis mett, at okkara heimafloti hevur verið ov stórur, og at veiðitrýstið á fiskastovnarnar tí hevur verið alt ov stórt.

Avleiðingin hevur verið, at fiskidagarnir hjá einstøku skipabólkunum hava verið skornir yvir ein kamb. Hetta uttan mun til um einstaka skipið hevur brúkt sínar dagar ella ikki.

Um vit skulu minka heimaflotan, og harvið eisini lækka veiðutrýstið á okkara fiskastovnar, kundi ein møguleiki verið at álagt vinnuni eina brúksskyldu. T.v.s. at um talan er um skip, sum als ikki ella bert í lítlan mun brúka sínar fiskidagar, so verða hesi fiskiloyvi inndrigin, soleiðis at hesi skip fara úr flotanum.

Hetta hevði ikki einans minkað um flotan soleiðis, at okkara heimafloti gjørdist fíggjarliga burðardyggur, men tað vildi eisini havt við sær, at tað í minni mun gerst neyðugt at skerja í fiskidøgunum hjá teimum skipum, sum veruliga stríðast fyri at skapa virði fyri samfelagið.

Ein brúksskylda hevði somuleiðis havt við sær, at ein partur av spekulatiónini, sum er farin fram í fiskivinnuni seinastu árini, hevði fallið burtur. Ein spekulatión, ið einans tænir teimum, sum ikki vísa áhuga fyri at reka fiskivinnu, men í staðin selja sínar dagar, sum tey fáa ókeypis frá landinum, beinleiðis víðari við vinningi fyri eyga. Ein vinnigur, sum verður goldin av teimum, sum dagliga berjast á sjónum til gagns fyri samfelagið.

Veit sjálvandi væl, at loyvi, sum ikki eru í nýtslu í dag, hvørki økja um flotan ella veiðutrýstið. Eitt er tó heilt víst, so skjótt fiskiskapurin tekur seg upp aftur, so vakna hesi loyvi úr dvala. Hetta fer at hava við sær, at flotin verður alt ov stórur og veiðutrýstið alt ov høgt. Tá verður helst aftur neyðugt hjá politiska myndugleikan at skerja fiskidagarnar hjá teimum, sum veruliga stríðast á sjónum fyri at skapa virði til samfelagið.

**Kvotuhækkingin í Barentshavinum**
Omanfyri nevndu broytingar vildu verið skilagóðar, og verða mettar neyðugar, um flotin í longdini skal hava møguleikan at gerast burðardyggur. Tann tilfeingiskreppan, sum heimaflotin líður undir í løtuni krevur tó, at flotin fær eina bráðfeingis hjálp. Eina bráðfeingis hjálp, sum kann bjarga flotanum fyribils.

Kvotan í Barentshavinum fyri 2009 er hækkað munandi. Tí vil eg fegin heita á landsstýrismannin í fiskivinnumálum um fyribils at tilluta heimaflotanum kvotuhækkingina. Hetta varð roynt miðskeiðis í 90-árunum, tá heimaflotin eisini var í tilfeingiskreppu. Tað varð bjargingin hjá heimaflotanum.

# Føroyagrunnurin frá 1971 skaptur av upparbeiddum ognum í og úr Klaksvík

JÓGVAN VIÐ
KELDU
fyrrverandi borgarstjóri, landsstýris- og løgtingsmaður



**Tað eru aktivini hjá p/f J. F. Kjølbro í Klaksvík, sum er grundarlagið undir "Føroyagrunninum frá 1971". Eingin peningur – ikki eitt oyra –er komið úr Landskassanum, men avleiðingarnar av grunninum, sum varð skaptur við aktivum úr Klaksvík, hava givið landskassanum, kommunum og øllum Føroyalandi gylt í fleiri áratíggjur**

**1. partur**

Av og á stingur "Føroyagrunnurin frá 1971" seg upp í føroyska fjølmiðlakjakinum, eitt nú millum politikarar, leikfólk og tey, tá tey av eini ella aðrari orsøk ynskja at gera brúk av grunninum. Flestu teirra hava misskilt, hvussu hesin grunnur sá dagsins ljós.

Í fyrstu atløgu eigur at verða staðfest, at grundarlagið undir grunninum eru ognir (aktivir) upparbeidd av Kjølbro-fyritøkuni við heimstaði í Klaksvík Hesin hevur havt og hevur framvegis stóran og avgerandi týdning fyri mong heim um alt landið.

Fyri í lítlan mun at seta málið eitt sindur í perspektiv, so gjørdi Kjølbro fyritøkan, sum tá hevði tætt undir 1.000 fólk í arbeiði, m.a. íløgur í 1950- og 60árunum á Skála í ávíkavist turkihús og síðani í Skipasmiðjuna, við tí fyri eyga at byggja skip.

**Skála og rannsóknarferð kostaðu dýrt**
Sum hjá øðrum vinnulívsfeløgum gjørdist íløgan í turkihús heldur stutt tíðarskeið, so ilt var at fáa íløguna afturgoldnað. Skipasmiðjan fekk ikki hepni við avlopi. Tí komu, sum vit minnast, sum fyrst í 1960unum arbeiddu á avbjóðandi skrivstovuni hjá Kjølbro, dagliga telex, um at senda pening út til hesi hóttu vinnumál. Vit sóu, so gott sum hvønn morgun umbønir um fleiri tíggjutúsund krónur, sum var nógv tá.

Í samband við hesa drening av peningi úr Klaksvík, og at Kjølbro fyritøkan í 1959 gjørdi rannsóknarferð til Eysturgrønlands – uttan almennan pening - við "Karini K", sum móðurskipi við 11 útróðrarbátum, kom felagið í likviditetstrupuleikar.

Vit skulu hava í huga, at felagið í fleiri áratíggjur við dugnaskapi og góðum fólki hevði uppbygt sær sterka fyritøku við dygdartólum, framkomnum skipum eins og útróðrarbátum, vinnu- og handilshúsum.

Um alt hetta og meiri, liggur drúgv og áhugaverd frágreiðing.

**Likviditetstrongdin, kommunan og Tjóðbankin**
Av teirri orsøk, at felagið kemur í likviditetstrongd, kemur danski tjóðbankin inn í myndina í 1962 við Viggo Kampmann, forsætisráðharra, sum hjálparmanni, við einum likviditetsláni uppá 4 mió. krónur. Felagið hevði jú ein virðismiklan tátt fyri alt landið. Nevndin varð tá víðkað við Dánjali Niclasen og Jóhan K. Joensen, sum vóru góð boð uppá nevndarlimir.

Samstundis yvirtók Klaksvíkar Komuna Kósakaiina frá J. F. Kjølbro fyri eitt høgt virði, har nýggja flakavirkið skuldi standa. Virkið fór undir framleiðslu í 1965. Sjóvinnubankin fíggjaði flakavirkið á Kósini.

Í 1963 varð kredittturin í Tjóðbankanum víðkaður við 2 mió. krónum.

Tá ið møguleikarnir ikki tyktust at verða fyri í eini handavend at gjalda lánið aftur, avgjørdi danski tjóðbankin at umskipa (konvertera) lánið til partapening, sum skapti "Føroyagrunnin frá 1971" við 7 mió. krónum, har Jóanes Kjølbro framvegis er ein lítil partaeigari í JFK-Trol.

**Óláta̋ðir føringar**
Lat tað verða sagt, at her kom ikki eitt oyra úr landskassanum. Partapeningurin kom burtur aktivunum, sum Kjølbro í Klaksvík hevði bygt upp gjøgnum árini, sum varð veð fyri partapeningin og "Føroyagrunnin frá 1971".

Tí er bæði ólátað og ósmæði, tá aðrir partar av Føroyum, politikarar sum onnur, halda seg eiga ella hava rætt til grunnin, sum upparbeiddur er í og úr Klaksvík við aktivum hiðani, sum gjørdist grundarlag undir hesum nú so vælskipaða grunni við eini serstakari nevnd.

Hinvegin, at politiski myndugleikin og Landsstýrið hevur ábyrgd fyri at gera nakað fyri útjaðarapartar, sum Suðuroynna og Sandoynna, við grunnum ella øðrum átøkum, er sjálvsagt, men tann peningur kann á ongan hátt takast úr "Føroyagrunninum frá 1971", har grundarlagið er aktiv úr Klaksvík.

**Fari í komandi parti at gera aðrar viðmerkingar.**

# Heilsan til landsmenn mínar

Jólini eru hátíð ljóssins og barnanna. Tá gerast øll fólk gávumild og geva hvørt øðrum gávur. Men EIN er gávan, ið ber av øllum, tað er gávan sum Gud gav okkum, tá ið Hann gav okkum Jesusbarnið, frelsaran, ið varð føddur í eini krubbu, tí at hann ikki fekk innivist í gistihúsinum í Betlehem.

Eftir at Jesus varð føddur, royndu menn beinanvegin at drepa hann. Heródes kongur gjørdist illur, tá ið vísmennirnir fóru ein annan veg heimaftur úr Betlehem. Heródes hevði biðið vísmenninar koma til Jerusalem at siga sær hvar Jesusbarnið var, fyri at Heródes kundi drepa hann. Hetta var jú ein kongssonur, ið var borin í heim, og Heródes metti sostatt, at hann ein dag fór at taka kongadømi frá sær. Tí gjørdist hann øvundsjúkur inn á kongasonin, ið føddur var.

Í vreiði síni yvir at vísmenninir høvdu svikið hann, við ikki at siga honum frá hvar Jesusbarnið var, drap hann øll dreingjabørn í Betlehem og har á leið, sum vóru 2 ár og yngri, fyri at vera vissur um, at barnið, ið skuldi frelsa heimin, var millum tey deyðu.

Men Gud sendi ein eingil til Jósef og segði við hann:

*"Tak Mariu og Jesusbarnið við tær og flýggja til Egyptalands og verð har. So skal eg siga tær frá, tá ið teir eru deyðir, sum ætla at drepa barnið."*

Jesus elskar okkum við einum ævigum kærleika, og tí varð hann føddur.

Tá ið Hann gjørdist vaksin, segði Hann:

*"Eg eri ljós heimsins og salt jarðarinnar – ljósið skínur í myrkrinum, men myrkrið skilti tað ikki."*

Við hesum seinastu orðunum meinti Jesus, at fólk ikki skiltu Guds vilja.

Jesus vil ikki at nakar syndari doyr, men at øll skulu venda við til Hansara, fyri tey skulu hava ævigt lív.

Veist tú, vinur mín, at tú ert elskaður av Gudi? Hann hevur umsorgan fyri tær og tekur sær av tínum trupulleikum? Kalla á Hann og Hann skal svara tær.

Legg lív títt í hendur Guds, tá ert tú tryggur, og tá fært tú tann frið, sum menniskju ikki skilja – frið, sjálvt í øllum ganginum og ófriðinum í hesum heimi.

Miss ikki mótið, tí Jesus elskar teg, vinur mín.

Við hesum vil eg ynskja øllum landsmonnum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár við tøkk.

**Gunnar Joensen,
Marstal, Danmark**